# 1,3 miljónir norðmenn hoyrdu Lisu Frederiksberg

**Góðar 1,3 miljónir norskir útvarpslurtarar hoyrdu Lisu Frederiksberg syngja ein jólasang á føroyskum**

**TÓNLEIKUR**
*Jonhard Hammer*
*jonhard@sosialurin.fo*



P1-kanalin hjá Norska Ríkisútvarpinum, NRK, hevði Tollaksmessudag eina samrøðu við Hera Simonsen frá Rás2. Í samrøðuni, sum vardi 6-7 minuttir greiddi Heri frá, hvussu føroyingar halda jól. Í endanum av innslagnum spældi NRK-P1 Lisu Frederiksberg av Strondum, sum sang jólasangin "Í hvørjari vrá nú lýsa", sum er ein upprunaliga norskur jólasangur frá 1931. Jakob Sande skrivaði sangin. Sum á norskum eitur: "Det lyser i stille grender". Tað er sami Jakob Sande, sum hevur gjørt tær nýnorsku yrkingarnar, sum Hanus Johansen hevur gjørt løg til.

P1 er tann rásin, sum hevur flest lurtarar í Noregi. Og roknað verður við, at uml. 1,3 miljónir lurtarar hoyrdu jólasendingina Tollaksmessukvøld.

Heri fekk afturmeldingar frá fleiri norðmonnum og føroyingum, sum búgva í Noregi. Eitt, sum tey flestu bóru upp á mál var, hvussu vakur sangurin hjá Lisu Frederiksberg var.

## VEÐRIÐ




**Veðrið fríggjadagin og leygardagin**
Landnyrðingur, 5 til 10 m/s, seinni norðan. Skiftandi skýloft, kavi ella kavaæl, men so líðandi bert kavaæl. Hitin millum 2 og 5 stig, sunnunáttina tó um frostmarkið.




**Veðrið sunnudagin**
Sunnan, sum so líðandi veksur til 13 til 20 m/s av suðri og landsynningi. Skýggjað og so líðandi regn. Hitin hækkar til millum 5 og 8 stig




**Veðrið nýggjársaftan**
Nógvur vindur av suðri, 18 m/s og regn, Seinni minkar hann vindin av útsynningi, 8 til 13 m/s, og hann klárar í. Hitin um 8 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -9 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | -5 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 3 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 3 |
| London | 5 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 2 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | -1 |
| Keypmannah. | 3 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | -1 |
| Berlin | 1 |
| Warzawa | -1 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | -2 |
| Paris | 0 |
| Madrid | 4 |
| Róm | -- |
| Malorca | 10 |
| Athen | 9 |
| Malta | 13 |
| Tunis | 12 |
| Beijing | 5 |
| New Dehli | 18 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | -- |
| New York | 1 |
| Miami | 15 |
| Los Angeles | 12 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | -- |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 28 |

## LUFTTRÝSTIÐ





Eitt lágtrýst sunnanfyri Ísland ferðast í ein norðan, og dýpist nakað, og brúgvaløg fara framvið Føroyum úr útsynningi, og verða fylgd av lufttráki við ælaveðri. Fríggjadagin og leygardagin nærkast fleiri lágtrýst av útsynningi og vestri móti Skotlandi og sunnanfyri Føroyar. Sunnudagin ferðast eitt djúpt lágtrýst seg til Danmarkarsundið av suðri, og tilhoyrandi brúgvaløg nærkast Føroyum av vestri og fara framvið oyggjunum nýggjársaftan (mánadagin).

**Veðrið restina av degnum**
Í kvøld minkar hann vindin nakað av útnyrðingi, niður í eini 10 m/s. Skiftandi skýrák, men í nátt kavaæl og lækkandi hitastig

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 16/12 kl. 06⁰⁰ – 17/12. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,8°
Minsti hiti máldur í desember: -7,2° - Mesti hiti máldur í desember: 12,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 3,0 mm – mált frá 16/12 kl. 06⁰⁰ – 17/12. 06⁰⁰
Avfallið higartil í desember: 99 mm




## VESTFALLSKYRRINDI

17. des. Fyrra kvarter
22. des. Mánin næstur jørðini
24. des. Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 27. Des | 09.14 | 21.36 | 08.14 | 20.36 | 08.29 | 20.51 | 11.14 | 23.36 | - | 12.14 | 07.29 | 19.51 | 06.29 | 18.51 | 09.29 | 21.51 | 10.29 | 22.51 | 08.59 | 21.21 | 10.14 | 22.36 |
| 28. Des | 09.59 | 22.32 | 08.59 | 21.32 | 09.14 | 21.47 | 11.59 | - | 00.36 | 12.59 | 08.14 | 20.47 | 07.14 | 19.47 | 10.14 | 22.47 | 11.14 | 23.47 | 09.44 | 22.17 | 10.59 | 23.32 |
| 29. Des | 10.50 | 23.15 | 09.50 | 22.15 | 10.05 | 22.30 | 00.32 | 12.50 | 01.32 | 13.50 | 09.05 | 21.30 | 08.05 | 20.30 | 11.05 | 23.30 | - | 12.05 | 10.35 | 23.00 | 11.50 | - |
| 30. Des | 11.30 | 23.53 | 10.30 | 22.53 | 10.45 | 23.08 | 01.15 | 13.30 | 02.15 | 14.30 | 09.45 | 22.08 | 08.45 | 21.08 | 11.45 | - | 00.30 | 12.45 | 11.15 | 23.38 | 00.15 | 12.30 |
| 31. Des | - | 12.26 | 11.26 | - | 11.41 | - | 01.53 | 14.26 | 02.53 | 15.26 | 10.41 | 23.20 | 09.41 | 22.20 | 00.08 | 12.41 | 01.08 | 13.41 | - | 12.11 | 00.53 | 13.26 |

